# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hoydalar ein brandfella

Tað var ein syndarliga sjón fríggjadagin at síggja gomlu gentukostdeildina í Hoydølum brenna í grund eftir lítlari løtu. Hesin bygningur, sum fyri 75 árum síðani varð bygdur at hýsa økta virkseminum hjá Tuberklasanatoriinum - og sum seinastu meira enn 40 árini hevur verið karmur um virksemið hjá Føroya Studentaskúla - fyrst sum næminga- og lærarabústaður, seinni til undirvísingarendamál.

Samstundis sum hetta var syndarligt, er hetta eisini ein týðulig ávaring til avvarðandi myndugleikar um trygdina á Føroya Studentaskúla og um trygdina sum heild í føroyskum skúlum og almennum bygningum annars.

Lukkutíð hendi vanlukkan uttan fyri skúlatíð. Ferðsluviðurskiftini við Studentaskúlan í Hoydølum eru milt sagt kaotisk, og tað hava tey verið í nógv harrans ár - tí eitt eljustríð við myndugleikar um vegaføring ikki kann loysast. Hetta kundi í ringasta føri kostað mannalív, um illa vildi til fríggjadagin. Tað sigur seg sjálvt, at 99 ára gamla omankoyringin til skúlan ikki er tíðarhóskandi. Heisn vegurin, sum er fyrsti millum bygdavegur í Føroyum, varð gjørdur til hestavognar 14 ár áðrenn fyrsti bilurin kom til Føroya. Hann er snøgt sagt ikki hóskandi til teir hundraðtals bilarnar, sum koyra til og frá studentaskúlanum hvønn einasta dag.

Vit kunnu bara ímynda okkum, hvat hevði hent, um talan var um eldsbruna í sjálvum studentaskúlabygninginum mitt í skúlatíðini. Brandbilarnir høvdu ongan kjans havt at komið fram at skúlanum, og so als ikki stigabilurin. Har hevði verið eitt kaos - einir 150 bilar og 700 fólk, vit kunnu bara ímyndað okkum katastrofuna...

Hvussu verður og ikki, so skal støða beinanvegin takast til, hvussu hølisviðurskiftini hjá Studentaskúlanum aftur verða bøtt. Rættast hevði verið at bygt ein nýggja tíðarhóskandi skúla - og hví ikki saman við øðrum miðnámsskúla, sum t. d. handilsskúlanum. Tað vildi verið ein visjón, sum vildi nakað. Men í fyrstu syftu áttu myndugleikarnir at nýtt 100 ára dagin hjá Sanatoriivegnum sum vegamótið, har ferðsluviðurskiftini hjá skúlanum í Hoydølum vórðu avgreidd einaferð med alla!

**Sosialurin**

# Barsilsskipanin má broytast

**Í Sosialinum fríggjadagin varð víst á, at partur av tí peningini, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum gjalda beinleiðis til Barsilsskipanina, fer í landskassan. Hetta tí, at Barsilsskipanin er á fíggjarlógini og ikki sjálvsstøðugur grunnur, sum t.d. Arbeiðsloysisskipanin.**
**Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Arbeiðarafelag og S&K eru samd um, at Barsilsskipanin má broytast**

Stýrið fyri ALS hevur júst boðað frá, at tað fer ikki at lækka ALS-gjaldið, hóast arbeiðsloysið er sera lágt í løtuni. Hetta verður gjørt fyri at hava okkurt at standa ímóti við í verri tíðum.

Hesin møguleiki finst ikki fyri Barsilsskipanina. Tað eru somu partar, arbeiðsgevarar og løntakarar, sum gjalda inn til bæði ALS og Barsilsskipanina. Tað er tó bara á hesum økinum, at skipanirnar kunnu samanberast. Barsilsskipanin er ikki sum ALS ein sjálvstøðugur grunnur, men er hinvegin beinleiðis partur av fíggjarlógini. Tað merkir, at í góðum tíðum sum nú, tá nógv virksemi er í samfelagnum, og inngjaldið harvið er høgt, fer yvirskotið av skipanini beinleiðis til aðra nýtslu á fíggjarlógini. Hetta hendir, hóast tað eru partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum fíggja skipanina, og peningurin, sum verður kravdur inn, er oyramerktur til Barsilsskipanina.

Ein skipan sum Barsilsskipanin fer ongantíð akkurát at javnviga heilt, tí at bæði inngjald og útgjald eru ógjørlig at gera nágreiniligar metingar um. Politiski myndugleikin hevur ásett, at tað eru partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum hava ábyrgd av at fíggja Barsilsskipanini. Tí er trupult at ímynda sær, at landskassin fer at traðka til í verri tíðum, har inngjaldið frá arbeiðsmarknaðinum verður ov lágt. Hetta merkir tí í veruleikanum, at inngjaldið altíð verður í hægra lagið, til tess at tryggja at skipanin ikki gevur undirskot.

Føroya Arbeiðsgevarafelag og fleiri fakfeløg hava fyrr víst á, at Barsilsskipanin eigur at verða skipað á sama hátt sum ALS, og at báðar skipanirnar, og kanska aðrar við, verða lagdar í ein arbeiðsmarknaðardepil, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum vara av. Tá politiski viljin er, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum skulu gjalda, er eisini rímuligt, at tað eru hesir partar sum stýra slíkum skipanum á ein skinsaman hátt.

Tað líkist ongum, at skattgjaldarin, bæði arbeiðsgevari og løntakari, gjalda pening, sum er roknaður til Barsilsskipanina, til beinleiðis aðra nýtslu á fíggjarlógina. Tað einasta rætta er, at eitt møguligt yvirskot av Barsilsskipanini verður lagt til síðis, soleiðis at hetta kann verða brúkt í verri tíðum, tá inngjaldið lækkar. Á henda hátt verða upp- og niðurgongdstíðarskeið javnaði og gjaldið til Barsilsskipanina meiri stabilt.

Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Arbeiðarafelag og S&K eru samd um, at her má broyting koma í, ongantíð ov skjótt. Tað er hesir partar, sum gjalda til skipanina og gera tað við tí fyritreyt, at hetta er til at fíggja Barsilsskipanina. At eitt yvirskot fer beinleiðis í landskassan og ikki verður hildið í Barsilsskipanini, kann als ikki verða góðtikið.

**Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Arbeiðarafelag S&K**

# Akkordarbeiðið er til stórt gagn

HERI SIMONSEN



Lat tað verða sagt enn einaferð: Akkordarbeiðið er til stórt gagn. Undirritaði skal grundgeva við nøkrum dømum um hví akkordarbeiðið gagnar bæði arbeiðsgevara og arbeiðstakara:

**A) Ruskinnsavnanin:**
Ruskinnsavnarnir hava eina mánadags til fríggjadags akkord. Tað merkir, at hava teir savnað alt ruskið saman til brennistøðina t.d. hósmorgun, so hava ruskinnsavnarnir frí inntil teir møta aftur næsta mánamorgun. Eru ring veðurlíkindi, sum t.d. kavi, hálka o.a. so verða teir sjálvsagt seinni lidnir, í ringastu førum: fríggjakvøld ella leygarmorgun. Men flestu vikurnar er rusk-innsavnanin ein motivasjónsfaktor ella ein "gularót" fyri rusk-innsavnarnar. Vit skattaborgarar sleppa skjótari av við ruskið. Arbeiðsgevarin fær arbeiðssetningin skjótari greiddan. Og eru øll væl vitandi um, at høvdu ruskinnsavnarnir ikki hesa einu gularótina: **akkordina** - hevði verið ómøguligt at fingið nóg mikið av fólki til ruskinnsavningina, um man í heila tikið hevði fingið nakran til at gjørt hetta arbeiðið.

**B) Landing av skipum:**
Reiðarar sum hava átt skip, sum eru komin inn at landa á Skálafjørðinum, hava havt tveir valmøguleikar. At landa skipið bíligari fyri tímaløn á Toftum, ella at landa skipini dýrari, men skjótari(!) við einari akkordskipan í Runavík. Nógvir reiðararar hava so valt akkord-landingina í Runavík, tí so eru teir slopnir skjótari út aftur við skipunum. Arbeiðsmennirnir á Toftum og í Runavík hava landað skipini samvitskufult, men undir heilt hvør sínum treytum. Og orsøkin til munin hevur verið, at Runavík hevur havt ein motivasjónsfaktor/gularót, sum Toftir ikki hevur havt!

**C) Vaskiarbeiðið á ídnaðarvirkjum:**
Nógv fiska- og ídnaðarvirki hava bara ein skáa uppá 8 tímar um samdøgurið til vaskiarbeiðið. Hetta tí nógv virki eru í gongd 16 tímar um samdøgurið. Tí hava fleiri virkisleiðslur valt at bjóða vaskiarbeiði út sum akkordarbeiðið. Hetta fyri at fáa tað gjørt skjótast gjørligt. Og fólkini, sum møta og gera hesi vaskiarbeiðið, møta við góðum treysti til hesar skeivu arbeiðstímarnir, og fáa arbeiðið væl frá hondum greitt. Uttan akkordarbeiði hevði soltið við fólki til júst hesi arbeiðið!

**Niðurstøða:**
Niðurstøðan av hesum má verða, at akkordarbeiðið er eitt gott samanspæl millum gløggar og visjonerar leiðslur og toppmotiveraði arbeiðsfólk. Tað er upp til hvønn einstakan arbeiðsgevara, um hesin vil hava arbeiðsfólk, sum eru motiveraði ella ómotiveraði! Ymist er sum valt verður á hesum øki!

Við akkordkvøðu

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.